# Pubbvitjan er obligatorisk




Tað ber snøgt sagt ikki til at vitja í Bretlandi uttan at fara á pubb. Bretar hava eina heilt serliga pubbmentan, og Londonbúgvar eru einki øðrvísi í so máta. Nýggj lóg á økinum ger tað nú møguligt hjá pubbum at hava opið alt døgnið, og tað gera nógvir londonbúgvar sær eisini dælt av. Har sum aðrastaðni er tað sjálvandi mest um vikuskiftið, at pubbirnar verða serliga nógv vitjaðar, men hóast troðkan ofta kann verða, so er tað ógvuliga sjáldan, at nøkur illstøða stendst av. Londonbúgvar eru nevniliga eitt rættiliga friðarligt og fyrikomandi fólkaslag. Sjálvandi finst eisini kriminalitetur har eins og aðrastaðni, treyðugt so, men tað er undantakið heldur enn regulin. Tá vit hetta leygarkvøldið í apríl spákaðu okkum gjøgnum Soho-býarpartin, so var tað sum á Ólavsøku, men hóast hetta var út móti miðnátt, hvørki sást ella hoyrdist nakað til nakran ófrið. Soho var annars fyri einum 20 árum síðani kent fyri skøkjulevnað og kriminalitet, men í dag er hetta avloyst av handlum og matstøðum, og bert hendinga stað sæst, sum bjóðar meiri kjøtlig upplivilsir.


























